### Eyðun hitar upp á Tvøroyri

Leygarkvøldið fer Eyðun Nolsøe at spæla í TB-húsinum á Tvøroyri. Hetta er seinasta almenna upphitingin, áðrenn hann skal vera við í Prix Føroyum seinni í hesum mánaðinum.

Eyðun Nolsøe hevur góðar tónleikarar afturat sær. Kim Hansen, Jens Marni Hansen, James Olsen og Johannus á Rógvu spæla undir, og Eyðun Nolsøe syngur og spælir kassagittar.

Eyðun Nolsøe hevur skrivað nýggjar sangir til Prix Føroyar tónleikakappingina, og hesir sangir verða millum tað, sum hann fer at spæla á Tvøroyri leygarkvøldið.

Bussar koyra í sambandi við tiltakið

### Konsert við Eivør og KaSahópinum

Leygardagin 19. februar verður stórsligin konsertframførsla við Eivør Pálsdóttir og íslendska KaSahópinum í Norðurlandahúsinum.

KaSahópurinn varð stovnaður í 2001, og hevur hann síðan tá regluliga havt konsertir bæði í Íslandi og aðrastaðnis, millum annað í Japan.

Tað eru íslendskar kvinnur, ið mannað bólkin hesaferð. Kvinnurnar, ið eru við, eru hesar: Nína Margrét Grímsdóttir, ið spælir klaver, Sif M. Tulinius og Helga Þórarinsdóttir, báðar á violin, Áshildur Haraldsdóttir, ið spælir á floytu og Bryndis Björgvinsdóttir á cello.

Og so verður Eivør sjálvsagt við sum sangrøddin í hópinum.

Konsertin verður einans framførd einaferð, og avmarkað atgongd er. Atgongumerki fáast til keyps í Norðurlandahúsinum, og á Kunningarstovunum í Runavík og Havn.

Konsertin verður leygardagin 19. februar kl. 17.00.

### Grýlur og Paradox

Leygarkvøldið verður konsert, DJ-show og grýlukapping í Badmintonhøllini í Havn.

Paradox fer at spæla, Pætur Magnussen - DJ Switch - fer at venda plátum, og Elin í Stórustovu fer at skipa fyri eini grýlukapping, har vinningar verða lætnir. Bussar koyra í sambandi við tiltakið.

# CD við føroyingum endaði uttanfyri




*Martin K. Mouritsen stillaði upp fyri CD á fólkatingsvalinu m hesaferð, men hvørki hann ella hitt føroyska valevni, Ása Sivertsen, kundu venda gongdina hjá flokkinum, sum ikki fekk umboðan í fólkatinginum*

**Tey bæði føroysku valevnini hjá CD fingu samanlagt 47 atkvøður, men tað munaði lítið í einum vali, har CD ikki kláraði at vinna sær umboðan í fólkatinginum**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Vit gjørdu tað, vit kundu, men tað var tíverri ikki nóg mikið.

Tað vóru orðini, sum forkvinnan í CD, Mimi Jacobsen, hevði at bera sínum fólki eftir fólkatingsvalið týskvøldið.

CD vann sær ikki umboðan í fólkatinginum, og tað fekk forkvinnuna at boða frá, at hon gevst sum leiðari fyri flokkin.

– Vit vóru fyrireikað til, at vit ikki fóru at fáa umboðan í fólkatinginum, tí veljarakanningarnar vístu tað, sigur Ása Sivertsen, sum var annað av tveimum føroyskum valevnum hjá CD til fólkatingsvalið.

Hitt valevnið var Martin K. Mouritsen, og tey stilladu bæði upp í høvuðsstaðarøkinum.

– Ætlanin er ikki, at flokkurin skal niðurleggjast nú, men tað verður roynt aftur næstu ferð, og flokkurin skal aftur savna undirskriftir fyri at kunna stilla upp, sigur Ása Sivertsen.

### Ása fekk 17

Ása Sivertsen stillaði upp á listanum hjá CD í Københavns Amt, og hon var spísskandidatur í Lyngby-økinum. Samanlagt fekk Ása 17 atkvøður.

Ása var uppstillað í øllum økjunum hjá CD í Københavns Amt, men í Lyngby stóð hon ovast á listanum hjá CD. Mannagongdin í Danmark er tann, at flokkarnir sjálvir gera av, hvør skal standa ovast á sínum list í hvørjum øki, og í hesum liggur eitt signal til veljararnar um, hvør flokkurin satsar upp á í tí økinum.

– Hetta var fyrstu ferð, at eg stillaði upp til fólkatingsvalið, og eg ætli mær ikki at stilla upp aftur, tað eri eg ov gomul til. Eg haldi, at yngri kreftir skulu sleppa fram at, men tað var nú stuttligt at royna hetta, sigur Ása Sivertsen.

### Martin fekk 30

Martin Karbech Mouritsen royndi seg í einum øðrum valøki í høvuðsstaðarøkinum, og hann fekk 30 atkvøður samanlagt.

– Eg hevði ikki roknað við tí stóra, og eg vitsti frammanundan, at tað er sera trupult at fáa atkvøður, um tú ikki ert kendur, sigur Martin K. Mouritsen.

Veljararnir seta ofta krossin hjá sær við flokkin heldur enn valevnini, um tað ikki eru kend fólk á listanum, og soleiðis var eisini í økinum, har Martin var spísskandidatur. Har fingu valevnini á listanum bara fimm prosent av teimum 250 atkvøðunum, sum flokkurin fekk, og tí var ikki nógv at býtast um.

– Eg hevði vónað at fingið nakrar fleiri atkvøður, men tað skuldi ikki verða. Eg eri eina uppliving ríkari, og tað hevur verið áhugavert at verið partur av valstríðnum, sigur Martin K. Mouritsen, sum hevur brúkt einar 10.000 krónur til at føra seg fram undan valinum.

– Flokkurin fekk eitt knock-out týskvøldið, og hetta valið vísir bara, hvussu trupult tað er at koma afturíaftur, um tú fyrst er farin út úr fólkatinginum.

### Tað næsta verður kommunuvalið

Samstundis sum Mimi Jacobsen takkaði sínum fólki fyri valstríðið og fyri seg, gjørdi hon greitt, at CD heldur fram at stríðast fyri sínum politisku málum.

– Úrslitið hesaferð merkir avgjørt ikki, at vit gevast á hondum, segði Mimi Jacobsen.

– Vit ætla okkum at stríðast fyri teimum grundleggjandi virðunum og meiningunum, sum okkara flokkur byggir á. Vit fara at vera við í tí politiska kjakinum, og vit vilja arbeiða fyri einum samfelag, har tað er pláss fyri øllum.

– Tað næsta verður kommunuvalið, har vit fara at stilla okkara bestu fólk upp og arbeiða fyri okkara kjarnumálum. Hetta eru mál, sum í lokalum samanhangi, gerast enn meira sjónlig, sigur Mimi Jacobsen á heimasíðuni hjá CD.

# Vísa nýggjan film um bjarging

**Norðoya Bjargingarfelag skipar fríggjakvøldið fyri temakvøldi um tilbúgving. Á tiltakinum, sum verður í KÍ-høllini í Klaksvík, verður millum annað ein stuttfilmur um bjarging frumsýndur**

TEMADAGUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*Nýggi filmurin um bjarging verður frumsýndur í KÍ-høllini fríggjakvøldið, tá ið Norðoya Bjargingarfelag skipar fyri temakvøldi um tilbúgving*

Tilbúgving verður í miðdeplinum á einum serligum tiltaki, sum verður í KÍ-høllini í Klaksvík fríggjakvøldið. Norðoya Bjargingarfelag skipar fyri, og fyrilestrar, framsýningar og annað verður á skránni.

– Sum oftast hoyra vit bara um tilbúgving, tá ið okkurt er galið, men nú royna vit at kasta ljós á tilbúgvingina í Norðoyggjum á ein meira positivan hátt, sigur Marjus Magnusson, sum er formaður fyri Norðoya Bjargingarfelag.

– Hetta er eisini eitt gott høvi hjá teimum, sum hava nakað við tilbúgvingina at gera, at hittast og koma at kenna hvønn annan, sigur hann.

Millum tað mest forvitnisliga verður ein nýggjur stuttfilmur um bjarging, sum hevur frumsýning hetta kvøldið. Hetta er ein filmur, sum Norðoya Bjargingarfelag hevur gjørt í samstarvi við Tekniska Skúla í Klaksvík.

Filmurin er feskur og kemur beinleiðis úr klippistudio og á hvíta tjaldið fríggjakvøldið.

### Tyrlan lendir í túninum

Kvøldið byrjar klokkan 19.00, tá ið borgarstjórin Steinbjørn O. Jacobsen fer at bjóða vælkomin og seta kvøldið. Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sum hevur tilbúgving sum sítt málsøki, fer at røða.

Borgarstjórin Halldór Halldórsson av Ísafirði í Íslandi fer at tosa um tilbúgving í sambandi við skriður og omanlop, og læknin Christian Maschmann fer at greiða frá um sína verkætlan við læknaambulansa í Klaksvík.

Politisturin Karl Johansen umboðar stovnarnar í tilbúgvingini og fer at tosa um tilbúgvingina í Norðoyggjum

Umframt alt hetta kunnu fólk eisini síggja ymiska útgerð og fáa meira at vita um hesa. Ein bjargingarbátur verður eisini blástur upp.

Atlanin er at samla so nógva útgerð sum møguligt, ið er knýtt at tilbúgvingini, niðanfyri KÍ-høllina. Har verða løgreglubilar, sjúkrabilar og sløkkiakfør, og um tað viðrar kemur tyrlan hjá Atlantic eisini at standa á parkeringsøkinum við høllina.

Tiltakið er ókeypis, men øll, sum møta upp, fáa stungið eitt atgongumerki í hondina, sum verður við í lutakastinum um eina flogferð millum Føroyar og Danmark.